Bláí Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

# Søkt verður eftir kokki

Við hesum verður søkt eftir kokki til Blákross-heimið.

**Uppgávur/arbeiðsøki:**
- ábyrgd av køki og hjalli
- matgerð
- innkeyp av vørum
- tilrættalegging av matarskrá

**Førleikar/eginleikar:**
- tú ert útbúgvin kokkur, ella hevur líknandi útbúgving og/ella royndir á økinum
- tú ert álitisvekjandi og álítandi
- tú ert fyrikomandi og hevur samstarvsvilja
- tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- tú vilt arbeiða samsvarandi blákrosshugsjónini

**Løn/setanartreytir:**
Talan er um starv uppá 0,8 tíð. Lønin verður ásett smb. avtalu. millum Fíggjarmálaráðið og Starvs-mannafelagið.

Meiri fæst at vitað um starvið við at venda sær til Olgu Magnussen á tlf. 315575 ella blakrossheimid@blakross.fo

Umsókn saman við evt. prógvum, viðmælum v.m. skal verða okkum í hendi í seinasta lagi

**sunnudagin 26. februar 2006.**

Umsóknin skal stílast til Nevndina fyri Blákross-heimið.

**Blákrossheimið**
Olga Magnussen, Leiðari
Lynggøta 12
FO-100 Tórshavn

*Bláí Krossur Føroya hevur smb. §2 í viðtøkum felagsins til endamáls:*
*- at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum*
*- at fyribyrgja, at fólk misnýta rúsdrekka og onnur rúsandi evni*
*- at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi*
*- at boða gleðiboðskapin um Guðs kærleika til menniskju*

# Vøruhúsið í Runavík
Soknast eftir vaskifólki at byrja skjótast tilber

Arbeiðið umfatar reingerð av handlinum og møbladeildini

Arbeiðstíðin er í miðal 26 tímar um mánaðin

*Umsóknin skal sendast til*
**Heiðavegur**
**600 Saltangará**

Meiri fæst at vita við at venda sær til Hjørdis Jørgensen á telefon 216185 ella á 448280

**Vøruhúsið í Runavík**

**Heimarøktin**
**og Serforsorgin**
*Heimarøktin*

# Húsavørður

**Søkt verður eftir húsavørði til Røktar-heimið á Mørkini á Streymnesi at byrja 1. mars ella skjótast tilber**

Røktarheimið á Mørkini er nýggjur bygningur sum væntandi verður tikin í brúk í mars mánaða 2006.

Á heiminum er pláss fyri 32 búfólkum, sum koma at búleikast í fýra eindum við átta búfólkum á hvørjari eind.

Heimið er partur av Heimarøktini øki 2 við tilvísing til økisleiðaran. Heimið er bygt út frá einum grundleggjandi tanka um eitt so heimligt og aktivt umhvørvi sum møguligt.

**Arbeiðsuppgávur eru m.a.:**
- Vanligt viðlíkahald av bygninginum, útbúnaði og økinum uttanum
- Tryggja at el, vatn, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
- Tryggja at eldsløkkiskipanin er í lagi
- Portørtænasta inni í heiminum
- Køkshjálpitænasta

**Vit vænta av tær, at tú:**
- hevur handverkaraútbúgving
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- ert røkin
- hevur koyrikort

**Vit kunnu bjóða:**
- Góðan møguleika til at brúka tíni skapandi evni
- Góða innleiðslu og neyðug skeið til at røkja teknisku útbúnaðin
- Eitt heimligt og hugnaligt umhvørvi, har hvør einstakur kennir seg væl

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður at seta 01. mars 2006 ella skjótast til ber. Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Ser-forsorgina við setanarstaði í Heimarøktini. Tæn-astustaðurin er fyribils Heimarøktin Vágoy/Norð-streymoy.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara tlf. 333249/282249.

Umsókn saman við prógvi, og møguligum við-mælum verður at senda til :

**Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy**
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 21. februar 2006**

# Bussførari

Søkt verður eftir bussførara til Bygdaleiðir.

**Ring tlf. 589010**

# Hjálparfólk
## til Barnaverndartænastuna í Suðuroy

Kundi tú hugsað tær at virkað og arbeitt fyri, at børn og ung í Suðuroy fáa tryggleika, umsorgan og ein tryggan uppvøkstur? Kanska átti tú tá at umhugsa at søkt arbeiði á Barnaverndartænastuni í Suðuroy.

Nú kommunurnar hava fingið ábyrgd av barna-verndini, hava vit á barnaverndartænastuni í Suðuroy brúk fyri einum fólki í fulltíðarstarvi ella 2 fólkum í hálvtíðarstarvi. Hesin/hesi skulu hjálpa okkum at bøta umstøður og kor hjá teimum, sum ikki hava nóg mennandi og tryggan barn- og ungdóm.

Vit vilja, at tú kanst taka við starvinum skjótast gjørligt.

Barnaverndarumsitingin, sum umboðar umleið 5000 suðringar, húsast í løtuni í býráðshúsinum á Tvøroyri. Fyribils fara 2 fólk at arbeiða har. Arbeiðið verður fjølbroytt og umfatar m.a. heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við og seta stuðlar í starv, sum skulu hjálpa og menna barnið í og uttanfyri heimið. Í arbeiðinum fert tú eisini at samstarva við nógvum fakfólkum m.a. innan heilsuverk, námsfrøði og sálarfrøði. Tú kemur at taka tær av nógvum ymiskum barnaverndarmálum - gomlum sum nýggjum - og virkisøkið okkara verður innan karmarnar av nýggju barnaverndarlógini.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur hóskandi útbúgving (t.d. sosialráðgevi, lærari, pedagokur, (barna-)sjúkrasystir e.t.
- At tú hevur arbeiðsroyndir sum málsviðgeri í almennari umsiting og/ella hevur royndir frá barnaverndararbeiði.
- At tú ert fleksibul og hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálv-støðug/ur í arbeiði tínum.
- At tú hevur gott innlit og evnar at síggja álvaran í teimum málum tú arbeiðir við.
- At tú ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi.

Innlit og royndir frá barnaverndararbeiði kann vera ein fyrimunur, men er ikki eitt krav.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði
- møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar
- møguleika fyri flekstíð og at arbeiða heima part av tíðini.

Lønin verður avtalað við støði í útbúgving og galdandi avtalum við fakfelag títt.

Meira fæst at vita frá Susanne Madsen á tlf. 371085 ella teldupost: susanne@tvoroyri.fo

Umsókn við relevantum viðheftum kunnu sendast til:

TVØROYRAR KOMMUNA
**Tvøroyrar Kommuna**
Postboks 80
FO-800 Tvøroyri
Mrk.: starv barnaverndarumsitingin

Freistin at søkja er: mánadagin tann 20. februar 2006. Skriva eisini, um tú ynskir at verða hálv- ella fulltíðarsett/ur.